Fylgiskjal 11

VERKAFÓLK

Tórshavn 09. feb 2026

Hoyringssvar viðv. leigustuðli

Feløgini í Verkafólk – Føroya Arbeiðarafelag, Føroya Fiskimannafelag, Havnar Arbeiðarafelag, Havnar Arbeiðskvinnufelag, Klaksvíkar Arbeiðskvinnufelag og Klaksvíkar Arbeiðsmannafelag – taka undir við uppskotinum og mæla til at samtykkja tað. Leigustuðul kemur ógvuliga væl við hjá familjum, sum leiga, og er við til at javnseta fólk sum leiga og fólk sum eiga.

Feløgini vísa á, at møguliga kundi verið ásett, at er talan um stakan persón, so skulu inntøkur omanfyri 1,25 arbeiðaraløn hjá støkum persóni mótroknast við 5% og er talan um pør, so skulu inntøkur omanfyri 2 arbeiðaraløni mótroknast við 5%. Á henda hátt verður leigustuðul tengt at ítøkiligari inntøkuáseting, og tað er rímiligt og fylgir onkusvegna gongdini á arbeiðsmarknaðinum. Hugtakið arbeiðarainntøka verður eisini brúkt í t.d. lógini um dagpening, so tað er ikki eitt fremmant ella nýtt hugtak, sum verður tikið inn í føroyska lóggávu.

Hartil vilja Verkafólk heita á Almannaráðið um at gera uppskot um loft á leigu og mark á, hvussu nógv leigukostnaðurin kann hækka í einum árið.

Feløgini heita eisini staðiliga á Almannaráðið um at dagføra lógina um familjuískoyti og gera nýggj inntøkumørk, sum minna um inntøkumørkini í hesi lógini umframt at dagføra satsirnar til fíggjarligar sperdar barnafamiljur. Hetta hevði veruliga muna hjá familjum, sum eru fíggjarliga sperdar.

Vinarliga vegna Verkafólk,

Sonja J. Jógvansdóttir, samskipari